## Glaslist í Riberhús

Hendan mánaðin sýnir Hans Andreas Hansen glaslist í Riberhus í Fuglafirði. Framsýningin lat upp í dag. Hans Andreas Hansen, sum er leirvíkingur, men sum býr í Esbjerg, hevur arbeitt við glaslist í fleiri ár. Hann hevur eisini havt fleiri framsýningar bæði í Føroyum og í Danmark. Framsýningin í Riberhus í Fuglafirði er opin hendan mánaðin.




## Pisudagur fyri komandi lesandi

Aftur í ár verður møguleiki hjá øllum teimum, ið fara undir hægri lestur, at koma á Pisudag, at frætta nærri um øll tey praktisku, fíggjarligu og sosialu viðurskiftini ið standa fyri framman, hjá ein nýggjum lesandi í einum nýggjum býi. Fundirnir verða í Eik í Saltangará í kvøldið 5.august klokkan 19 og í ungdómsdeildini hjá Eik í Tórshavn mikukvøldið 6. august við hesi skrá: Meginfelag Føroyskra Studenta (mfs.fo) greiður frá um praktisku viðurskiftini, og hvat MFS fæst við - EIK greiður frá um tey fíggjarligu viðurskiftini - Altjóða Skrivstovan (ask.fo) greiður frá, um hvat tað vil siga, at fara undir hægri lestur - Stuttur steðgur - Farið verður í bólkar, har møguleiki er at tosa vid lesandi, ið lesa í sama lestrarbýi og at tosa við onnur, ið fara sama veg. Umframt okkurt lekkurt til góman, fer fløguaktuelli Petur Háberg at spæla tónleik.



# Sjálvstýrisflokkurin klárur til samstarv

**Kári P. Højgaard og Kári á Rógvi eru báðir áhugaðir í einum samstarvi við samgonguna. Men teir ynskja nøkur ávís mál gjøgnumførd afturfyri**

POLITIKKUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Seinnapartin í dag hava tinglimir Sjálvsstýrisfloksins fund við landsnevndina um møguligt samstarv við CHE samgonguna. Men longu fyrr í vár gav landsfundurin grønt ljós fyri samstarvi við samgonguna, og tí fer landsnevndin neyvan at mótmæla tí. Spurningurin er so hvørji krøv, flokkurin setur til samstarvið.

Sjálvstýrisflokkurin hevur longu lagt ein lista við løgmálum fram, sum flokkurin ynskir at fremja í hesum samgonguskeiðnum. Hesi mál umfata millum annað altjóða sáttmála fyri brekað, verjulóg og menning av skúlamálum. Og bæði Kári P. Højgaard og Kári á Rógvi siga við Sosialin, at tað er avgerandi, hvørji mál teir fáa framd. Tað tykist ikki sum áhugin fyri at gerast partur av sjálvari samgonguni er so stórur.

Kári P. Højgaard staðfestir, at tað hevur týdning, at semja fæst á fiskivinnuøkinum, og flokkurin heldur fast við, at Eysturoyartunnilin skal vera ein privat verkætlan.

### Politikkurin setast á dagsskrá

Hin tinglimurin hjá Sjálvsstýrisflokkinum, Kári á Rógvi, eru eisini hugaður at samstarva við samgonguna, og hann vil eisini heldur tosa um politisk mál enn formanssessir.

- Tað týdningarmesta er politikkurin. Um Sjálvstýrisflokkurin fær ein landsstýrismann í onkrum smámáli, merkir tað jú ikki, at tey politisku mál, sum vit berjast fyri, verða framd, sigur hann.

Kári á Rógvi heldur annars eisini, at núverandi støðan við minnulutastjórn letur upp fyri áhugaverdum møguleikum. Ikki minst at Løgtingið fær ein størri leiklut.

- Higartil hava nógv mál verið gjøgnumførd av umsitingini í samstarvi við seráhugamál, meðan tey sum umboðað føroyska fólkið hava havt ov lítla ávirkan.

Men við einari minnilutastjórn broytist hendan støðan, heldur hann og vísir til leiklutin hjá Radikala Vinstra flokkinum í Danmark.

### Verjulógin løgd framaftur

Í Tinginum í dag gekk Kári á Rógvi við einum uppskoti til nýggja verjulóg undir arminum. Uppskotið verður kunngjørt í dag, og væntandi lagt fram fríggjadagin. Sama uppskot varð lagt fram fyrr í vár, men varð tá avvíst, tí landsstýriskvinnan á økinum, Helena Dam á Neystabø, segði at ráðið arbeiddi við málinum.

- Men lógin er ikki broytt síðani 1922, og við einari meirilutastjórn kunnu landsstýrisfólk bara avvísa slík mál. Men nú er støðan broytt. Nú má landsstýrið lurta eftir teim fólkavaldu, greiðir Kári á Rógvi frá.

Og tí leggur hann uppskotið fram aftur nú.

Spurdur um Sjálvsstýrisflokkurin heldur ynskir sær frælsa leiklutin við minnilutastjórn heldur enn formelt samstarv, svarar tingmaðurin, at hann ikki sær nakra andsøgn í einum formellum samstarvi um týdningarmikil mál og einum frælsum leikluti í samstarvi við bæði samgongu og andstøðu.

# Løgtingið má styrkjast

**Bogi Eliassen, stjórnmálafrøðingur, hevur í blaðnum í dag áhugaverda greining av politisku støðuni. Niðurstøðan er millum annað, at skal Løgtingið vera ført fyri at uppfylla sína parlamentarisku skyldu, mugu tinglimir fáa betri umstøður**

POLITIKKUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Okkara løgtingsskipan er ov veik. So greið er niðurstøðan hjá Boga Eliassen, stjórnmálafrøðingi, í politiskari greining aðrastaðni í blaðnum í dag.

- Okkara tingfólk hava gamaní góða hjálp frá góðum fólki á Løgtingsskrivstovuni. Men hetta er ikki nøktandi, um vit ynskja ein proffessionella parlamentariska skipan á hædd við grannalond okkara, staðfestir hann.

Í dag hava løgtingslimir ikki egna skrivstovu og heldur ikki sína egnu teldu í Løgtinginum.

Tørvur er eisini á at hava hjálp knýtta at hvørjum tinglimi sær, sum tinglimurin og flokkurin kunnu brúka til at menna sínu egnu politisku visjónir og mál, sigur Bogi Eliassen.

Hetta er ein fyritreyt fyri, at løgtingslimirnir og flokkarnir kunnu gera bæði mótuppskot til samgonguna og vælfyrireika uppskot í samband við eina minnilutastjórn.

Stjórnmálafrøðingurin vísir á, at okkara politikkarar hava líka nógv málsøkir, sum politikkarar í størri londum at taka støðu til. Færri tinglimir og smærri flokkar gera, at hóast flokkarnir hava framsøgufólk á málsøkjum, eru tað sera breið økir til hvønn einstaka politikara. Tí hava okkara politikkarar sera nógv mál at seta seg inn í og taka støðu til og tørv á betri



*Føroyar eru ikki til reiðar til minnilutastýri, heldur Bogi Elisassen, stjórnmálafrøðingur*

arbeiðsumstøðum.

Í politisku greiningini metir Bogi Eliassen eisini um møguleikarnir fyri víðkan av samgonguni og samstarvið við andstøðuna. Hann heldur, at tað mest sannlíka er, at Sjálvstýrisflokkurin verður tikin inn í samstarvið. Brennandi spurningurin er, sigur hann, hvat kostar stuðulin frá Sjálvstýrisflokkinum og vil samgongan gjalda hann.